Eg eri ein Kristin

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 2001, kemur útbarnafløga, ið nevnist: »Eg eri ein K«.

»Eg eri ein K« er ein fløga við 12 barnasangum, sum verður at fáa í sølubúðum kring alt landið fyri einans 139,- kr. Flestu av hesum 12 sangunum, eru sangir, sum bæði børn og vaksin kenna frá sunnudagsskúlanum, barnamøtum og barnalegum. Sum dømi kunnu vit nevna: »Pætur út á vatnið gekk«, »Ein vísur maður«, »Eingin so kann síni varða«, »Ansa eyga lítla«, og »Ja, Jesus elskar«. Tó er talan um onkra nýggja týðing, Brita á Váli Smith hevur týtt sangin »Tá eg sum barn« eftir svianum Gøte Strandsjø.

Sangurin er væl kendur frá fløguútgávuni við vøggurvísum hjá kendu svensku sangarinnuni Carolu.

Ungu sangarnir, sum eru 10-13 ár, eru genturnar sum manna gentukórið í Ebenezer, sum hevur verið undir leiðslu av Onnu D. Háberg seinastu tvey árini. Tó syngja tveir dreingir eisini við á hesi útgávuni. Talan er um Kristin R. Mouritsen og lítla Hjørt P. Háberg. Genturnar, ið syngja við á útgávuni, eru: Beinta Andreassen, Simona Heinesen, Simonika Hammer, Anna í Kálvalíð, Jóna Gunnnarsson, Hellen Haraldsen, Jórun Krett, Halla Áargarð, Gunnvá Áargarð, Barbara Røsvik, Kristina á Váli, Beinta Svensson, Súsanna Nielsen og Guðrun P. Háberg. Anna D. Háberg syngur sjálv við í trimum sangum, og Vilhelm H. í Skálanum syngur við í tí eina.

Svend Aage Drewsen, sum upprunaliga tók stig til hesa verkætlan, hevur staðið fyri tónleikinum til 9 av teimum 12 sangunum, og er her talan um glaðan rútmiskan tónleik, og ikki kann sigast annað, enn at tað hevur eydnast honum, at lata hesar gomlu sangir og kór í ein spennandi, nýggjan búna. Regin Guttesen hevur skipa fyri tónleikinum til 2 sangir, og eru hesir, Regini líkt, meiri friðaligir, og Jan Zachariassen hevur við hepnari hond tikið sær av vakra sanginum »Eingin er sum tú«.

JakZac studio í Havn hevur verið karmur um upptøkurnar, sum eru gjørdar í vár.

Svend Aage Drewsen, Anna D. Háberg og Pætur H. Háberg hava lagt sangirnar tilrættis og staðið fyri ljóðblandingini. Hesi trý hava eisini gjørt kápuna til fløguna.

Leygardagin 25. august kl. 12.00, verður høvi hjá børnum og vaksnum at hoyra sangirnar úr »Eg eri ein K« uppi í handlinum hjá BR-leikum á Smyrilsvegi 7. Absalon Áargarð og kendu »dukkudreingirnir« vera við.

Leygardagin 1. september fáa fólk í Eysturoynni høvi at hoyra sangir úr »Eg eri ein K« uttanfyri »Brotið« í Saltangará. Byrjað verður kl. 14.00.

Leygardagin 29. september vera sangir úr fløguni at hoyra á Torginum í SMS.

Í samband við útgávuna, er gjørd ein heimasíða á alnetinum, ið nevnist: »www.eg-eri-ein-k.com«. Útgevarnir meta sangirnar á »Eg eri ein K« at vera dýrgripir, sum kunnu vera bæði ein gleði og signing fyri børnini. Fløgan verður eisini eitt gott høvi hjá vaksnum fólki, at lýða á sangskattin frá barnaárunum.

SKEMT 2000

fæst í sølubúðunum kring alt landið
Kostnaður 120,-

Enn er møguleiki fyri at ogna sær allar 12 SKEMT bøkurnar í signeraðum eintøkum fyri ein samlaðan prís á einans kr. 650,-

Bíleggið nú og tit fáa tær sendandi beinanvegin. Ringið til Sosialin á tlf. 31 18 20

Sosialurin - 311820

FLOGFRAKT
SJÓFRAKT
hurð til hurð
SAFARI TRANSPORT
www.safari.fo
GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
Tel. 32 22 22

Sosialurin - 311820

STØDUGT FLEIRI HALDA Sosialin
WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Bústa.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

Embætisfólk samráðast um Skipaeftirlit

Politisk semja er fingin í lag við danir um, at Skipaeftirlitið skal undir føroyskt málsræði. Tí eru yvirtøkusamráðingarnar nú komnar niður á embætisstøði. Í gjár fóru føroysk embætisfólk til Danmarkar at samráðast um praktisk og lógarteknisk viðurskifti viðvíkjandi yvirtøkuni

YVIRTØKA
John Johannessen

Føroyingar sleppa at yvirtaka Skipaeftirlitið við hjálp frá dønum.

Hetta lyftið hevur Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, fingið frá danska vinnumálaráðharranum, Ole Stavad, sum varar av Skipaeftirlitinum.

Og tí eru føroyski landsstýrismaðurin og danski ráðharrin vorðnir samdir um, at tað ikki longur er neyðugt hjá teimum báðum beinleis at taka lut í samráðingunum um yvirtøkuna. Í staðin skulu embætisfólk hjá báðum pørtum fáa greiðu á praktisku og lógarteknisku viðurskiftunum, ið fylgja við yvirtøkuni av Skipaeftirlitinum.

Arbeiða við fullum seglum

Mikudagin fóru embætisfólk úr Fiskimálastýrinum til Danmarkar á fund við embætisfólk hjá danska vinnumálaráðharranum. Tey skuldu fundast seinnapartin mikudagin og hósdagin. Heimafturkomin skulu tey síðani kunna landsstýrismannin um gongdina í samráðingunum.

– Tað var ikki neyðugt hjá mær at fara við til Danmakar at samráðast. Tí Ole Stavad hevur longu givið tilsøgn um, at Skipaeftirlitið verður yvirtikið – enntá við danskari hjálp. Men verður nakað ivamál, hava vit avtalað at tosa saman um hetta í telefon. Tí, sum Ole Stavad sjálvur segði, telefonin er uppfunnin, sigur Jørgen Niclassen.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur ikki hug neyvt at útgreina og seta vekt á, hvørjir eru teir størstu praktisku og lógarteknisku spurningarnir, ið skulu útgreinast. Men hann ger greitt, at arbeitt verður við fullum seglum fyri at hava alt klárt, so Skipaeftirlitið kann yvirtakast 1. januar 2002, eins og løgtingið hevur samtykt.

Tó torir Jørgen Niclassen ikki at lova, at Skipaeftirlitið verður yvirtikið júst 1. januar.

– Vit arbeiða sum sagt við fullum seglum. Men stutt tíð er eftir til 1. januar, og vit skulu finna høli, fáa starvsfólkaviðurskiftini upp á pláss og so framvegis. So eg tori einki at lova, sigur Jørgen Niclassen.

Danir hjálpa

Jørgen Niclassen heldur, at danir higartil hava verið sera hjálpsamir í málinum um at yvirtaka Skipaeftirlitið. Og hetta er eisini neyðugt, tí hóast Skipaeftirlitið verður føroyskt, verður fyrstu tíðina neyðugt við neyvum samstarvi og hollari ráðgeving frá dønum, sum áður hava umsitið stovnin. Tí tað er ikki bert um at siga tað at stápa eitt Skipaeftirlit upp á beinini.

Av somu orsøk roknar Jørgen Niclassen eisini við, at Skipaeftirlitið í fyrstu syftu fer at koyra eftir donsku reglunum, eins og tað ger nú. Men sum frá líður skal stovnurin lagast spakuliga til føroysk viðurskifti, eins og krøvini til skip fara at verða lagað til føroysk viðurskifti. Í veruleikanum verður talan helst um eina skiftisskipan á tvey til trý ár, har føroyska Skipaeftirlitið fer at rinda fyri tænastur frá danska Skipaeftirlitinum.

Ætlanin er eisini at finna eina loysn, har føroyingar koma at hava møguleika at útbúgva seg innan skipaeftirlit hjá dønum.

Trygdin í hásæti

Í sambandi við ætlaðu yvirtøkuna av Skipaeftirlitinum hava summið ivast í, um slakað fer at verða í minstukrøvunum.

Men Jørgen Niclassen vissar um, at trygdin fer at verða sett í hásæti við einum føroyskum skipaeftirliti.

– Krøvini fara tó helst at verða lagað eitt sindur til føroysk viðurskifti. Danska Skipaeftirlitið setir strong krøv til ferjur og farmaskip, meðan tað setur linari krøv til smábátar, meðan krøvini í Íslandi eru hørð til smábátar. Hetta kemur av, at danir hava so nógvar ferjur og farmaskip og fáar smábátar. Í Føroyum hava vit nógvar smábátar, og fer eitt føroyskt eftirlit tí helst at seta strangari krøv til smábátar, enn tað verandi danska, greiðir Jørgen Niclassen frá.

Í sambandi við trygdina ætlar Jørgen Niclassen, at Føroyar skulu fáa atlimaskap í IMO, ið er altjóða stovnurin, ið setur minstukrøvini fyri trygd umborð á skipum. Danir skulu hava fund við IMO í London í oktober, og har vera føroyingar við, fyri at kanna møguleikan fyri atlimaskapi.

Í løtuni eru tað bert tvey lond, ið hava fingið atlimaskap í IMO. Tey eru Hong Kong og Makao. Men Jørgen Niclassen vónar kortini, at tað fer at bera til hjá føroyingum. Atlimaskapur í IMO merkir, at vit fáa øll rættindi og allar skyldur, sum limalondini hava, men at vit ikki fáa atkvøðurætt.

– Atlimaskapur í IMO hevur nógv at siga fyri okkum, sigur Jørgen Niclassen.

Heinta íblástur til sjódepil úr Hetlandi

Óli Holm, landsstýrismaður við mentamálum, hevur seinastu dagarnar verið í Hetlandi og leita sær íblástur til ein møguligan sjódepil fyri útbúgvingar innan fiskivinnuna

ÚTBÚGVINGAR
John Johannessen

Ein sjódepil til útbúgvingar og skeið, sum vinnan hevur og kemur at hava tørv á.

Hetta mælir álitið um útbúgvinar innan fiskivinnuna landsstýrismanninum við ábyrgdini fyri útbúgvinarverkinum til at seta á stovn. Og í hesum sambandi hevur Óli Holm, landsstýrismaður, seinastu dagarnar vitjað North Altantic Fisheries College í Hetlandi, fyri at finna sær íblástur til ein føroyskan depil fyri fiskivinnuútbúgvingar.

North Atlantic Fisheries College er ein sjódepil, ið hetlendskir myndugleikar hava skipað saman við vinnuni. Og tað er júst hetta, ið hugtekur landsstýrismannin.

Óli Holm heldur, at nógv av tí, sum hetlendingar hava gjørt við sínum sjódepli, eisini kundu verið gjørt í Føroyum. Serliga heldur hann tað vera áhugavert, hvussu vinnan í Hetlandi hevur staðið saman um at fáa sett á stovn teirra sjódepil.

– Tað er eingin ivi um, at sjódepilin í Scalloway hevur gjørt nógv til, at teir gaca eina alivinnnu, sum er á stødd við okkara og sum mennist við risaferð. Teir eru farnir í holt við at ala fleiri onnur fiskasløg væl hjálptir av royndum, ið hava verið gjørdar á sjódeplinum í Scalloway, sigur Óli Holm í tíðindaskrivi.

Óli Holm ætlar sær í næstu framtíð saman við embætisfólkum sínum at arbeiða víðari fyri, at føroyska ali- og fiskivinnan fær ein væl virkandi føroyskan sjódepil.

Frá vinstru Gordon Johnson, skúlastjóri, Óli Holm, landsstýrismaður og Craig B. Kensler, varaskúlastjóri